# Mentamálaráðið

**Lógartænastan**

Dagfesting: Skrivið her
Mál nr.: Skrivið her
Málsviðgjørt: FP/HZH/TH
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Uppskot til**

## Kunngerð um broyting í kunngerð um upptøku í gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar

(upptøka í serflokk og broytingar í reglum um upptøku til hægri fyrireikingarbreyt)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 7 frá 22. januar 2013 um upptøku í gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar, sum broytt við kunngerð nr. 21 frá 7. apríl 2014, kunngerð nr. 19 frá 23. mars 2015 og kunngerð nr. 60 frá 11. mai 2016, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** *Inngangurin* verður orðaður soleiðis:
"Við heimild í § 2, stk. 5, § 16, stk. 2, § 24, § 25, stk. 4 og 6 og § 26, stk. 2 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, løgtingslóg nr. 54 frá 15. mai 2014 um broyting í løgtingslóg um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, verður ásett."

**2.** Aftan á § 4 verður sett:

*"Upptøka í serflokk"*

**"§ 4 a.** Umframt vanligu upptøkutreytirnar skulu umsøkjarar til serflokkar til upptøkusamrøðu í avvarðandi útbúgvingarstovni.
*Stk. 2.* Ein upptøkubólkur umboðandi útbúgvingarstovnin, Sernám og Almannaverkið hevur samrøður við umsøkjarar til serflokkar.
*Stk. 3.* Upptøkubólkurin ger tilmæli til leiðara útbúgvingarstovnins, ið tekur avgerð um upptøku.
*Stk. 4.* Tilmælið frá upptøkubólkinum tekur støði í fakligu og sosialu heildarstøðu næmingsins í mun til serflokkatilboðið.
*Stk. 5.* Tilmælið tekur eisini støði í raðfestum plássi, hølisplássi og flokssamanseting."

**3.** *§ 5* verður orðað soleiðis:
"Umsøkjarar, sum ikki lúka treytirnar í § 4, t.d. tí tey koma úr útlendskari skipan, ið ikki samsvarar við tað føroysku, kunnu tó verða tiknir upp við støði í meting leiðara útbúgvingarstovnsins. Meting leiðarans skal byggja á møgulig ársmet og royndarmet, sum umsøkjarin hevur við sær, á møgulig førleikaummæli og á samrøðu ella á møguliga fakliga

upptøkuroynd í einari ella fleiri lærugreinum.”.

**4.** Í *§7*, verður sett inn sum nýtt stk. 2: “Umsøkjarin skal hava lokið royndirnar í § 7, stk. 1, nr. 1-3 við nóg góðum úrsliti og vera førur fyri at fylgja undirvísingini á nøktandi hátt.” *Stk. 2* verður til “Stk. 3” og *Stk. 3* verður til “Stk. 4”.

**5.** *§7 stk. 4* verður orðað soleiðis: “Umsøkjarar til 2 ára fyrireikingarbreytina, sum ikki lúka krøvini um upptøku sambært stk. 2, verða kallaðir inn til upptøkusamtalu á tí stovni, teir hava sett sum fyrsta breytaynski. Samtalan er grundarlag undir avgerð útbúgvingarleiðarans um upptøku.”

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið, dagfesting

**Rigmor Dam**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen